at vita, hvør fru Hansen hevur verið. Men tað kann roknast við, at fru Jacobsen frá Gøtu man hava verið Inga, kona Absalon Jacobsen, kendur seinni sum Absalon á Skála. Hann hevði nevniliga úthandil fyri Faktorin í Syðrugøtu, og tí hevur kennskapur verið millum tey.

Her skal vera komið eitt sindur inn á hendan úthandil. Hann byrjaði so tíðliga sum í 1860, tvey ár eftir, at Faktorin tók við í Klaksvík. Tvey tey fyrstu árini var hann rikin av Gregorius Johannesen, vanliga kallaður Grækaris á Gørðum, í Syðrugøtu. Hann hevði bert handilin í tvey ár, tá hann fór av knóranum.

Grækaris var ein heilt sjáldsamur maður. Hann var bóndi, luttók í almenna kjakinum og var eisini løgtingsmaður. Mest kendur er hann fyri sín skaldskap, og hann fer at verða umrøddur í eini komandi Miðviku.

Men tað sum hevur áhuga í hesum sambandinum er, at hann eisini yrkti um Faktorin, og sigast kann, at henda yrking ikki er tað sum í dag kallast ja-lig. Kanska hevur hann havt agg, tí hann hevur mist úthandilin.

Her skal verða endurtikið okkurt brot í vísuni:

Jeg raader for alt
Og hersker alene med Magt og Gevalt,
Den hele Maskine, den driver med mig
Som jeg stiller Uhret, saa skal det gaae
Ej viges derfra.

Anvendes kan her
Hvad Ludvig den Fjortende sagde om sig
At Staten i Frankerig: dette er mig
Jeg har og i Haand alle Tøjler af Magt
Som jeg med Foragt.

Men som jeg sad glad
Og drømte hvor fast jeg i Sadelen sad
Da greb en Tanke saa pludselig fat
Den nemlig: Du kan bortøde din Skat
Thi Lykken kan muligen vende dig Ryg
Tro dig ej for tryg.

Tað tykist sum at Grækaris metir Faktorin fyri at vera ein ov maktfullan mann, og tað hevur hann kanska eisini verið sæð hjá onkrum.

Aftaná Grækaris verður tað Skúla-Jógvan, sum rekur handilin. Sum tað liggur í orðinum hevur hann eisini verið lærari, tann fyrsti í Gøtu. Hann var føddur 21. september 1820 og var giftur við Onnu Johannesdatter f. 17. augustt 1825. Hann byrjaði at undirvísa í juni mánaða 1839.

Millum hansara ættarfólk eru tey í Bartalstovu í Gøtu.

Men í 1897 er tað Absalon Jacobsen, sum tekur við. Hann var ættaður av Dunganum í Syðrugøtu, og hann giftist við



*Familian Absalon Jacobsen, sum rak úthandil í Gøtu fyri Faktorin: f.v. Absalon (1871-1944), dóttirin Inga Malena (1902-1994), sonurin Dánjal Pauli (1904-1936) og Inga (1864-1950), sum kom úr Gøtu at vitja Egil*



NAADE OG SANDHED
FOR UNGE OG GAMLE

Nr. 5. | MAJ 1918. | 4. Aarg.

Gamle Jakob.

bolderen i den lille Fiskerby, kom daglig ud til ham. Vel var Vejen lidt lang,

*Hetta er blaðið, sum Egil setti sína grein í. Nærri verður greitt frá tí í komandi parti*

Ingu, sum var ættað av Toftum.

Við tí sambandi, sum tey hava havt við Faktorin, hava tey eisini kent Egil og hansara lagnu, og Inga er so farin til Havnar, har hon hevur vitjað hann.

Absalon flutti seinni yvir á Skála, har hann rættuliga kom at gera vart við seg sum vnnulívsmaður fram til 1930-ini. Hann átti skip og virkir og kom at merkja nógv fyri Skála. Hann var kendur sum ein serstakligur heiðursmaður. Ein abbadóttir er Anna, kona Poul Mohr, og eina abbasonur er Absalon Djurhuus, fyrrverandi lærari.

Tað er partur av hesi søgur, at Anna Maria, einkjan eftir son Absalon, Dánjal Pauli, giftist við Jógvan Húsgarð, sum fyrr er umrøddur.

**2. Marts**

Da Faster havde Kortparti om Aftenen havde jeg som følge deraf en fransk Visit af Sanna Kjelnæs og fru Evensen. Fru Evensen fortalte mig lidt angaaende det hollandske Skib. De have sikkert troet, at de skulde gaa under.

Havi roynt at hugt í bløðunum eftir meira um hesa hending, men havi einki funnið.

**3. Marts**

Egil var hendan dagin fyrstu ferð, síðan hann kom heim úr Danmark, úti í túninum. Hann fekk eitt prát við tey undir Klettti, sum fortaldu, at tað var ikki nøkur vón fyri Jóhan í Ólastovu, sum var innlagdur á Øresund hospitalinum (tuberkladeildini).

Johan var beiggi Kristian Djurhuus, sum seinni gjørdist løgmaður. Hann uppkallaði eisini ein son eftir honum. Hesin gjørdist ein virdur skrivstovustjóri í landsstýrinum í mong ár.

Longu tann 26. Mars 1918 er soljóðandi lýsing í Dimmalætting:

**Dødsfald**
At vor kære elskede Søn Johan er afgaaet ved Døden den 10. Marts d.A. paa Øresundshospitalet i København bekendtgøres herved for Slægt og Venner.
*Ellen og H.A. Djurhuus*

Johan gjørdist bert 22 ára gamal og varð jarðaður 21. mars 1918 í gamla kirkjugarði. Her liggur hann saman við foreldrum sínum, sum eru umrødd í røðini Hendur í Sleptu. Hann var bert ein av teimum mongu ungu, sum doyðu í hesum tíðum.

**5. Marts**

Egil var tvær ferðir úti fyri dyr í eitt korter hvørja ferð. Hittti Jens Evensen og Edvard Bærentsen og fekk eitt prát við teir.

Havde om Eftermiddagen besøg af Magnus fra Viderejde. Om Aftenen tog Tjaldur afsted. Arnedal og Bretling rejste "við alla." Hvørjir munnu teir hava verið?

**6. Marts**

**Sama Dimma**
Da det er "føðingardagur" hos min moder og Ove den 8. denne maaned sendte Johs telegram afsted.

Eftir at hava telvað við Johan í Grótinum "laa jeg og læste Krossurin og Dimmalætting. Krossurin var meget god, men Dimmalætting var den samme uforbedrelige Dimma som altid." Egil hevur opinbart havt eina greiða politisku støðu!

**7. Marts**

Da jeg atter befandt mig godt, var jeg oppe i nogen Timer. Om morgenen var jeg en lille Spadseretur for første gang oppe paa Brúgv. Fik en passiar med Sunnegrethe, Poul og Ogga. Siden var jeg inde hos Just Jacobsen. Han var meget gæstfri "blíður". Vi drak et Glas portvin sammen (fra Morgenstunden af). Siden fulgte han mig hjem. Da det var første Gang, siden jeg kom hjem, at jeg havde vovet mig saa langt, maatte jeg selvfølgelig blive meget forpustet. Og da det tillige var op ad Bakke, maatte det jo anstrænge mig en del. Bedre lykke næste gang, lad os haabe det!

**8. Marts**

Om Formiddagen havde jeg besøg af Binu fra Klaksvig. Vi sad og passiarede "eina góða løtu." Hun fortalte mig mangt og meget fra Klaksvig.

**13. Marts**

Da det var Fasters Fødselsdag, have hun nogle faa til Chokolade om Eftermiddagen. Tað var ein hópur av fólki inni á gólvinum hendan dagin.

Befandt mig meget godt hele Dagen. Havde "mærkeligt nok" ingen Opkastning.

**15. marts**

Var oppe hele dagen, befandt mig meget godt. Spadserede to gange. Om Morgenen var jeg ovre hos Evensens og om Eftermiddagen "uppi hjá" Herluf Lützen. Paa hjemvejen fik jeg mig en lille Passiar med Maria hjá Justines og Sigrid, Nancy (Svendsen) og Katrina (Christiansen). Siden hilste jeg lige paa Katrina á Verthúsinum (einkjan eftir Christian Edvard Djurhuus, sum tók við hotellinum eftir pápabeiggjan Hans Andreas Djurhus,) Hans C. Müller, Jens Mohr, Gudrid Olsen og Frederikka hjá Jens. Det var forresten "rættuliga fittligt at ganga úti."

Botnia var nyligt kommet fra København. Der var en masse islændere med. Vejret var meget pænt hele dagen.

**19. Marts**

Om Eftermiddagen havde Faster Dameselskab, og som følge deraf havde jeg mange Besøgende. Først var Ingeborg Lützen. Vi sad og passiarede "eina góða løtu."

Derpaa havde jeg besøg af Ammelena á Heygnum, der fortalte mig mangt og meget fra Klaksvig.

Om Aftenen havde jeg Besøg af fru Olivia Andreassen, Fru (Olavus) Jacobsen og Frk. Berg frá Sanatoriet.

Dagin eftir hevur fasturin Magdalena aftur "Dameselskab" við øðrum vitjanum.

## Tey á Heygnum

Ammalena er vermóður Søren á Krákusteini og harvið omma Albert, gudsonin hjá Egil. Hon er rættuliga ofta og vitjar, og hon kemur ta tá longu leiðina úr Klaksvík.